Vikuskiftis Sosialurin


*– Tilveran kann tíverri ikki koyrast í eitt reagensglas og kannast og analyserast, áðrenn vit fara í holt við hana*

*- Andsøgnin millum politikk og dýpd er vorðin alt størri. Dagsins politikkur snýr seg í størri og størri mun um "form, image og showbusiness"*

*– Tá onkur endiliga hevur megnað at dragsa meg suðureftir í eina viku, eri eg vanliga komin tveir dagar ov seint og farin tveir dagar ov tíðliga*

# leggur ikki vápnini



*– Víst hevði eg gjørt ymiskt øðrvísi, um eg fekk møguleikan at liva umaftur, men tá mistøk eru ein obligatoriskur partur av tí at liva, kann eg ikki siga, at eg í dag eri eitt angrandi menniskja, sigur ein afturlítandi Mogens Lykketoft eftir eina drúgva politiska yrkisleið á ovastu rók í danska ríkinum*
*Mynd: Ólavur Hansen*

ov tíðliga. Eg havi ikki dugað at "kobla frá", og stutt sagt havi eg havt torført við at skilja privata familjulívið og almenna arbeiðslívið sundur, sigur Lykketoft.

Men er Mogens Lykketoft so í dag ein angrandi maður?

- Tilveran kann tíverri ikki koyrast í eitt reagensglas og kannast og analyserast, áðrenn vit fara í holt við hana. Vit liva uttan at kenna framtíðina og avleiðingarnar av avgerðum, vit taka í nú´inum. Vit gera mistøk, vit angra, vit læra, vit mennast, og vit royna av nýggjum. Víst hevði eg gjørt ymiskt øðrvísi, um eg fekk møguleikan at liva umaftur, men tá mistøk eru ein obligatoriskur partur av tí at liva, kann eg ikki siga, at eg í dag eri eitt angrandi menniskja. Tvørturímóti meti eg meg hava alla orsøk at vera ein takksamur persónur. Eg havi fingið loyvi at vera við til at broyta mítt samfelag. Eg havi fingið loyvi at realisera mínar gávur og gera tað, eg allarmest brenni fyri. Eg meti sjálvur, at eg havi framt nøkur munadygg avrik á míni politisku yrkisleið, og hóast tilveran sum politikari hevur kravt síni offur, t.d. á privata økinum, havi eg havt eitt spennandi lív fylt við ríkum upplivingum, sigur Mogens Lykketoft.

### Der Untergang

Eftir eina sosialdemokratiska oyðimarkargongd kom stóra fallið fyri aðru ferð tann 8. februar í ár, tá Anders Fogh Rasmussen og borgarliga stjórnin enn einaferð fóru avstað við sigrinum. Mogens Lykketoft megnaði als ikki at endurreisa flokkin eftir lemjandi Nyrup-ósigurin í 2001. Lykketoft varð hvønn dag noyddur at úttala seg um katastrofalu meiningakanningarnar fyri sosialdemokratarnar, og uppgávan tyktist alt meiri vónleys fyri floksformannin, sum varð skýrdur at vera turrur, uttan fólkatokka, "gamaldags", ov akademiskur og uttan neyðugu evnini at appellera til breiða partin av fólkinum. Fakliga sterki og virdi akademikarin, sum við stórari succés var chefideologur nummar eitt handan danska búskaparpolitikkin undir Nyrup-stjórnini, var nú ímyndin av einum veikum tapara móti einum nógv sterkari mótstøðuparti. Seint um kvøldið tann 8. februar, tá tapið var veruleiki, legði Lykketoft loksins kongin í Copenhagen Jazz House, har hann við eini sterkari og kenslubornari talu, sum varð varpað beinleiðis út í hvønn krók í landinum, takkaði fyri seg.

Síðani tapið hevur fyrrverandi formaðurin ikki lagt fingrarnar ímillum í sínum hvøssu atfinningum móti fjølmiðlunum. Sambært Lykketoft var tíðindaflutningurin undir valdystinum eyðkendur av einum yvirfladiskum, populistiskum og sensationellum undirhaldsjournalistikki.

- Júst undanfarni valdysturin prógvaði, at modernaður politikkur er í svárari kreppu, tí andsøgnin millum politikk og dýpd er vorðin alt størri. Djúp og torskyld politisk mál verða simplifiserað, og dagsins politikkur snýr seg í størri og størri mun um "form, image og showbusiness", meðan innihaldið, substansurin og gjøgnumførda viðgerðin fær minni og minni rúm, sigur Lykketoft.

Men er tað ikki ov bíligt av einum so royndum politikara at geva fjølmiðlunum ábyrgdina av tapinum?

- Jú. Men eg havi framvegis ein keðiligan smakk í munninum, tá eg hugsi um valdystin. Ikki tí eg tapti, men tí eg fyri fyrstu ferð legði til merkis, hvussu vit eru farin at praktisera okkara politikk og høgt virda demokrati. Eg tapti, tí eg dugdi ov illa at laga meg til hesa gongd. Yvirfyri einum fjølmiðlaapparati, sum bert leitar eftir stuttskygdum og yvirfladiskum undirhaldstilfari, og sum vendir blinda eygað móti teimum veruligu samfelagstrupulleikunum, noyðist ein radikalt at yvireinfaldgera síni sjónarmið. Eg var noyddur at broyta mín framferðarhátt og tillaga meg ein leiklut, sum eg ikki dugdi at spæla. Eg var møguliga ov "gamaldags" at takkla tann mátan, pressan í dag arbeiðir uppá, sigur Lykketoft um søguliga tapið.

### Til deyðin okkum skilir

Eftir 24 ár sum fólkatingslimur og 40 ár á politiska vígvøllinum er eldhugurin framvegis har. Hann kennir einki til troyttleika. Hann kennir einki til líkasælu. Og hann kennir einki til strongd. Hóast søguliga ósigurin á fólkatingsvalinum hevur Mogens Lykketoft ongar ætlanir um at taka seg aftur. Hann vil vera við til at taka tær stóru avgerðirnar, og sum nýggjur framsøgumaður í uttanríkismálum hjá sosialdemokratunum kennir hann seg aftur á heimavølli.

- Eg havi ongar ætlanir um at gevast, og eg gleði meg til aftur at arbeiða við uttanríkispolitikki. Stríðið fyri tí góða samfelagnum heldur fram, og hesum vil eg stríðast fyri til mín doyggjandi dag, sigur Mogens Lykketoft at enda.